

## Konmansmýra er 25 ár

Í 1892 stóð greinastubbi í "Føringatíðindi" um at "Barnagoymslan" í Havn varð komin í lag. Barnagoymsla eru vit ikki, men heldur ein stovnur í menning. Vøggustovan á Konmansmýru fylti 25 ár 1.mars í ár, og nú fyllir Barnagarðurin 25 ár.Aftaná 25 ár er stovnurin lagdur saman til eina eind, og stórar broytingar standa fyri framman. Tí fara vit at skifta samleika og verður nýggja heiti avdúka 1. juli. Í hesum sambandi bjóða vit til opið hús týsdagin 1. juli frá kl. 16.00 til 18.00. Hendan dagin hevði tað glett okkum at sæð nógv tykkara, ið hava og hava havt tilknýti til stovnin, siga starvsfólkini á stovninum.




## Meira bjór frá Føroya Bjór

Á bryggjarínum í Klaksvík hava tey nú bryggjað meira India Pale Ale, sum er eitt av teimum trimum serligu ølunum, Føroya Bjór hevur bryggjað seinastu tíðina. - Stór undirtøka hevur verið fyri nýggju Sct. Brigid jubileums seriuni hjá Føroya Bjór, sigur Føroyar Bjór. Sct. Brigid IPA bleiv útselt beinanvegin, tískil er eitt bryggj gjørt afturat av hesum slagnum. Nú eru trý sløg av Sct Brigid seriuni bryggjað: ALE, IPA og Bohéme. - Vit bryggja víðari, verður sagt frá Føroya Bjór.

# Samgongan ósamd um skattalætta

**Samgongan er farin í tvíningar um ætlanina at avtaka skattalættan til fiskimenn, tí Gerhard Lognberg sigur kortanei.**

SKATTAPOLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg sigi kortanei til at avtaka skattafrádráttin til fiskimenn.

Gerhard Lognberg, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, sum eisini er í samgongu, er púra avgjørdur um ætlanina hjá landsstýrinum at avtaka skattalættan til fiskimenn.

Fríggjadagin boðaðu bæði Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og sjálvur løgmaður frá í Kringvarpinum, at samgongan hevur sett sær fyri at avtaka skattafrádráttin til fiskimenn í hesum valskeiðnum.

Men nú er tað samstundis greitt, at hetta er ein ætlan, sum samgongan als ikki er samd um og ein av teimum, sum leggur seg púra tvøran, er Gerhard Lognberg.

- Tað verður ikki við mínari hjálp, at fiskimenn missa skattafrádráttin, sigur Gerhard Lognberg.

Hann leggur afturat, at tað er heilt avgjørt, at hann fer aldrin av góðtaka, at samgongan tekur skattafrádráttin av.

### Samgongan handlingslammað

Sostatt er tað greitt, at samgongan er farin í tvíningar um ætlanina at avtaka skattafrádráttin.

Av samgongan telur bara 17 tinglimir, krevst, at øll samgongan er samd fyri at gjøgnumføra eitt politiskt mál.

Sostatt slepst ikki undan, at av tí, at Gerhard Lognberg noktar blankt at avtaka skattafrádráttin, er samgonganhandlingslammað í hesum máli.

Og av tí sama er tað heldur ikki greitt um tað yvirhøvur fer at eydnast samgonguni at strika skattalættan, tí tað er meiri enn ivingarsamt um nakar í andstøðuni er sinnað at hjálpa henni.

### Leggjast fyrst á fiskimenn

Gerhard Lognberg staðfestir, at vit frammanundan hava nógvar frádráttir í okkara skattaskipan.

- Handverkarar fáa skattafrádrátt og tey, sum hava longri enn eitt vist at ferðast til arbeiðis, fáa eisini ferðafrádrátt.

- Tí er tað undarligt, at landsstýrið, sum tað fyrsta, leggur eftir frádráttinum til okkara fiskimenn, sum hava borið okkara samfelagi uppi.

Javnaðarmaðurin úr Sandoy sigur, at skattafrádrátturin til fiskimenn er eitt slag av endurgjaldi fyri at teir eru so nógv burtur heimanífrá og sostatt missa nógv av tí, sum heimafólk annars fáa lut í av tilboðum og tænastum.

Hann vísir eisini á, at í Noregi er eisini ein fiskimannafrádráttur og hann er enntá akkurát nú hækkaður upp í 120.000 krónur um árið.



*Gerhard Lognberg sigur, at hann fer aldrin av góðtaka, at samgongan, sum hann er limur í, fer at avtaka skattalættan til fiskimenn, soleiðis, sum bæði løgmaður og Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, hava boðað frá*

### Als ikki viðgjørt

Gerhard Lognberg staðfestir eisini, at ætlanin um at avtaka fiskimannafrádráttin er als ikki viðgjørdur í samgonguni yvirhøvur.

Og tað er átaluvert, heldur hann.

- Samgongan má fáa høvi at viðgera stórmál sum hetta, áðrenn ein fráboðan verður útbasúnerað úr Tinganesi.

- Tað nyttar onki, at landsstýrið situr í onkrum króki og ger av, hvat er best fyri Føroya land, uttan at tað yvirhøvur er viðgjørt í samgonguni.

Gerhard Lognberg heldur, at mangan tykist tað sum um at landsstýrið beinleiðis gloymir, at tað er altso eitt Løgting, sum situr við endaligu avgerðini.

Hann spyr eisini, hvussu tað ber til, at samgongan pening til sendistovur um allan heimin, tá ið ráðini ikki eru til at lívga tey, sum halda lív í okkara høvuðsvinnu.

- Stuðul er ikki altíð av tí ónda. Lótu vit ikki rækjuflotanum stuðul á sinni, høvdu vit ongi rækjuskip í dag og fáa vit meiri inn í samfelagið enn vit lata í stuðuli, er hann væl givin út, tí so gagnar hann samfelagnum, sigur Gerhard Lognberg.

# Helena onga ætlan um at leggja frá sær

**Helena Dam á Neystabø dugir ikki at síggja hví hon skuldi lagt frá sær fyri tað um Kári á Rógvi slettis ikki møtti til tíma**

POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Helena Dam á Neystasbø hevur als ongar ætlanir um at leggja frá sær sum landsstýriskvinna í lógarmálum.

Hon heldur, at tað hevur hon als onga orsøk til.

Annars hava teir báðir tinglimirnir, Kári á Rógvi og Johan Dahl róð framundir, at hon hevur verið so klossut í síni handfaring av spurninginum um eykajáttan til stabilisatorararnar á Smyrli, at hon átti at stungið í sekkin og farið til hús.

Teir siga báðir, at hon hevur vitað so leingi, at neyðugt var við pengum til stabilisatorarnar, at hon átti at fingið tað við í sjálva fíggjarlógina.

Tað gjørdi hon ikki. Ístaðin kom hon við eini bráðfeingis umbøn til fíggjarnevndina, sum varð játtað í bráðskundi.

Kári á Rógvi heldur, at mannagongdin er ikki eftir bókini, tí tað eru bara bráðkomnar upphæddir, sum hava skund, sum kunnu játtast á henda hátt og tann eginleikan hevði hetta málið ikki.

Men Helena Dam á Neystabø heldur, at nú er tað onkur, sum hevur sovið í tímanum, ella sum slett ikki er møttur til tíma yvirhøvur og tað fer hon ikki at taka avleiðingarnar av.

Hon sigur, at hetta málið er viðgjørt so nágreiniliga og væl sum nakað mál kann vera tað.

- Tað er rætt, at vit vistu, at tað helst fór at vera neyðugt at gera stabilisatorarnar, sigur hon.

Men hon sigur, at alt hetta greiddi hon fíggjarnevndini frá væl og virðiliga í sambandi við fíggjarlógina.

- Men tá vistu vit ikki, um vit fingu pláss í dokk í ár og vit vistu heldur ikki nágreiniliga, hvussu nógv tað fór at kosta. Tí var vónleyst at seta pening av á fíggjarlógina, tí tað kunnu vit ikki gera fyrrenn vit vita tey nágreiniligu tølini.

Hon sigur, at tí var avtalan í fíggjarnevndini, at so skjótt, sum málið varð lýst út í æsir, skuldi landsstýrið venda aftur til fíggjarnevndina við eini umsókn um bráfeingisjáttan.

- Men Kári á Rógvi møtti ikki á tí fundinum og tí er hann kanska ikki kunnaður. Men tað má vera hansara ábyrgd og at krevja at eg skal leggja frá mær fyri tað, er burturvið, sigur Helena Dam á Neystabø.